FRÁ DREYMI TIL VERULEIKA

At seta føtur undir egið borð er altið ein stór avgerð.
Tí er umráðandi at leita sær ráð og figging, har hesi eru best.
Føroya Sparikassi hevur altið lagt stóran dent á sethúsafigging og hevur tí eisini tann serkunnleikan, ið krevst, fyri at kunna ráðgeva viðskiftafólki sínum á besta hátt í sethúsamálum.
Ætlar tú at keypa grundstykki, byggja, keypa, ella umvæla hús, er ein góð byrjan at tosa við Føroya Sparikassa.

Tá er besta loysnin í eygsjón.

FØROYA SPARIKASSI
SETHÚSAFÍGGING

Smádrongur fekk fløsku í høvdið

Ein føroyskur áskoðari varð tikin av løgregluni undir landsdystinum mikukvøldið. Hann tveitti eina glasfløsku eftir løgreglumanni, men rakti ein smádrong í høvdið

ÁSKOÐARAR
Eyðun Klakstein

Flestu av teimum 4.371 áskoðarunum til landsdystin millum Føroyar og Jugoslavia mikukvødlið skikkaðu sær, men ein áskoðari varð tikin av løgregluni, eftir at hann hevði tveitt eina fløsku

Mynd: Álvur Haraldsen

Fólk leitaðu sær í stórum tali til HM-landsdystin millum Føroyar og Jugoslavia á Tórsvølli mikukvøldið. Almenna áskoðaratalið var 4.371, og flestu av hesum áskoðarunum skikkaðu sær væl.

Men á áskoðaraplássunum aftan fyri málið, har trúgvastu føroysku áskoðararnir halda til, vóru tað ikki allir, sum dugdu at uppføra seg.

Ein maður, sum hevði fingið ov nógv inn um, tveitti eina glasfløsku eftir einum løgreglumanni, sum gekk framvið. Fløskan rakti ikki løgreglumannin, men hinvegin ein smádrong í høvdið.

Vaktarmaður fann fram til tann seka mannin, og eftir at hava tingast eina løtu fór løgreglan avstað við manninum, sum er skuldsettur fyri brot á politiviðtøkurnar.

Ein áskoðari, sum Sosialurin hevur tosað við, heldur, at atburðurin hjá hesum manni var út av lagi, og at fólk sótu sum kánus eftir hendingina.

12. maður harmast

Formaðurin fyri føroyska áskoðarafelagnum, 12. manni, heldur lítið um hendingina, sum hann eisini var vitni til.

– Hasin persónurin hoyrdi ikki til okkum, og vit vilja heldur einki hava við slík fólk at gera. Vit leggja upp til at hava tað stuttligt, og tað er avgjørt ikki soleiðis, at tað skal ganga fyri seg, sigur Regin Egholm.

– Vit eru fullkomiliga ímóti, at áskoðarar skulu gera um seg á slíkan hátt. Vit skulu heldur stuðla landsliðnum við rópum og sangi og hava tað stuttligt, meðan vit gera tað.

– At ein áskoðari tveitir eina fløsku á slíkum skilaleysan hátt, má ikki gerast ein vani, og vit kunnu bara ímynda okkum, hvat hevði hent, um fløskan endaði inni á vøllinum, sigur Regin Egholm.

Løgreglan væl nøgd

Løgreglan hevur sentrala uppgávu, tá stór tiltøk sum fótbóltslandsdystur er á skránni, og mikukvøldið var løgreglan sjálvsagt til arbeiðis.

– Okkara stóra uppgáva er at syrgja fyri, at fólk og ferðsla kunnu koma til og frá dystinum á ein tryggan hátt, og hetta gongst væl. Tað er gott lag millum fólk, tá tey fara til dyst, og sjálvt um vit tapa so nógv, so er ongantíð vandi fyri ófriði, sigur Jón Klein Olsen.

– Tað er munur á, tá fólk fara til fótbólt í Føroyum og í til dømis Danmark. Stemningurin er ein annar í Føroyum, og tað er eingin, sum ger seg inn á nakran.

Løgreglan hevði einar 10 mans umframt hjálparfólk til arbeiðis undir landsdystinum mikukvøldið, og tað var bert tann eini maðurin, sum varð handtikin í sambandi við dystin.

Gera átak fyri skitnari á

Áhugabólkurin Síl í Ósánna skipar á norðoyastevnu fyri framsýning í Ósáskúlanum

UMHVØRVI
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Eina ferð í tíðini var Ósáin ein rein og vøkur, men í dag er áin mest at samanlíkna við ein køst. Kloakkir renna út í ánna, og nógv órudd er í ánni.

Á norðoyastevnu tekur áhugabólkurin Síl í Ósánna við eini serligari framsýing eitt tak fyri skitnu Ósánni.

– Við framsýningini er ætlanin at vísa borgarunum, hvussu tíðin er farin við ánni og umhvørvinum har áleið, og hvussu vit kunnu venda gongdini, soleiðis at áin og umhvørvi aftur koma til heiður og æru, øllum borgarunum til gleði og gagns, sigur áhugabólkurin um framsýningina.

– Framsýningin skal eisini virka við til at økja um áhugan fyri umhvørvinum og umhvørvisvernd, soleiðis at vit sum borgarar og politikara altíð hava umhvørvi og umhvørvishugsanina við í tí, vit fyritaka okkum.

Framsýningin á norðoyastevnuna fer at vísa Ósánna fyrr og nú, og fólk kunnu fara uppí áhugabólkin, sum Abraham Mikladal og Kári Purkhús hava tikið stig til.

Framsýning um Ósánna verður opin, samstundis sum listaframsýningin í Ósáskúlin verður.

Ein áhugabólkur fer nú rættiliga undir arbeiðið at fáa Ósánna í Klaksvík aftur til heiður og æru

Kanna drekkivatnið í Føroyum

Í hesum døgum er ráðstevna í Vágunum millum londini í Útnorði. Til viðgerðar er drekkivatnið og vatnið á flakavirkjunum í Føroyum og Noregi. Endamálið er at skifta orð um royndirnar hjá hvørjum øðrum á tí heilsufrøðiliga økinum

HEILSUFRØÐILIG VIÐURSKIFTI
Stefan í Skorini

Fólk á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni hava gjørt kanningar av drekkivatni og av vatni á flakavirkjum í sambandi við norðurlendska fundin á Hotel Vágum komandi dagarnar

Mikudagin 6. juni byrjaði ein norðurlendskur fundur, har evnið verður matvøru- og veterinerøkið. Luttakandi londini eru Grønland, Ísland, Føroyar og Noreg.

Tað var Grønland, ið tók stig til samstarvið í 1995 millum londini í Útnorði, og fundirnir hava verið einaferð um árið, har felags viðurskifti innan matvøru- og veterinereftirlit hava verið viðgjørd.

Drekkivatnið

Høvuðsevnið hesuferð verður drekkivatnið, men eisini vatnið á flakavirkjum verður tikið til viðgerðar. Heilsufrøðiliga Starvsstovan í Føroyum og tann í Noregi fara at viðgera, hvussu støðan viðvíkjandi drekkivatni er í Føroyum og Noregi. Viðurskiftini í teimum báðum londunum kunnu í nógvum førum samanberast.

Í tí sambandi hevur Rikke Berg Larsen gjørt eina umfatandi kanning av vatngóðskuni á teimum føroysku flakavirkjunum.

Kanningin vísir, at vatnið á flakavirkjum er gott, men tað vísir seg ofta, at hetta vatnið er betri enn tað, sum borgararnir fáa úr krananum.

Soleiðis verður støðan lýst, og londini kunnu brúka hesar upplýsingar, tá tey standa við somu trupulleikum.

Njóta av royndum hjá øðrum

Endamálið við fundinum er at hava eitt kjaktorg í Útnorði, har serkøn fólk kunnu skifta orð um royndir á heilsufrøðiliga økinum hvør hjá øðrum. Samstarvið hevur til endamáls, at tey ymsu londini kunnu njóta av royndunum hjá hinum.

Londini í Útnorði hava mangan teir somu trupulleikarnar at dragast við á heilsufrøðiliga økinum, og tí er eitt samstarv sjálvsagt. Í hesum sambandi er ætlanin at skipa fyri býti av starvsfólki millum londini.

Niðurstøðan á seinasta fundinum í Grønlandi var, at hetta samstarvið er vert at halda á við, og tí royndir hjá øðrum koma einum sjálvum til góðar.

Luttakararnir eru til fyrilestrar á Hotel Vágum, men fara eisini at vitja vatnverk kring landið.

Føroyska mentanarvikan sett

Maria Heinesen og Heidrun Petersen spældu fiól, tá føroyska mentanarvika vard sett

Mynd: Edvard Joensen

Føroyska mentanarvikan í Nuuk varð sett í mentanarhúsinum Katuaq mikukvøldið

MENTAN
Edvard Joensen

Nuuk: Føroyska mentanarvikan í Nuuk, sum norðurlendski mentanarstovnurin í Grønlandi, NAPA, skipar fyri, varð sett í Katuaq mikukvøldið. Tað var Guðrun Gudmundsen, sum arbeiðir hjá NAPA, sum setti stevnuna, meðan Bula Larsen, sum eisini arbeiðir hjá stovninum, umsetti til grønlendskt.

Eini 80-90 fólk, har av tey umleið 40 vóru komin úr Føroyum, vóru hjástødd, tá tiltakið varð sett.

Setanin byrjaði við, at tveir musikskúlanæmingar úr Havn, Maria Heinesen og Heiðrunn Petersen, spældu nøkur løg á fiól, áðrenn Guðrun Gudmundsen og Bula Larsen alment settu stevnuna.

Samstundis sum tiltakið varð sett, byrjaði eisini ein framsýning við grafiskum verkum hjá Elinborg Lützen í Katuaq.

Meðan mentantanarvikan er í Nuuk, fara føroysk tiltøk at verða hildin ymsa staðni í býnum.

Eitt nú fer Lydia Didriksen, rithøvundur, at halda fyrilestrar um føroyska bókmentir á skúlum í Nuuk, eins og hon fer at sýna ymsar filmir úr og um Føroyar.

Føroysku musikskúlanæmingarnir fara at hava konsertir saman við grønlendskum næmingum og lærara teirra.

Kular Røtur úr Klaksvík fara at hava framførslur á ymsum skúlum, eins og limir úr Vága Dansifelag fara at sýna fram føroyskan dans og dansispøl.

Ymiskt um ull og ullarúrdráttir verður at síggja í Katuaq hesar dagarnar. Karin Brattaberg fer at sýna fram ymiskt, hon hevur gjørt úr føroyskari ull, eins og Gudrun Chemnitz úr Grønlandi fer at vísa ymiskt, gjørt er úr moskusull.

Filmurin Bye Bye Bluebird verður sýndur í Katuaq, eins og sjónleikur eisini verður at síggja í húsinum. Tað er ein leikur, gjørdur yvir søgu hjá Williami Heinesen, sum sýndur verður.

Sunnudagin fer Rúni Brattaberg at hava konsert saman við einum finskum pianisti.

Sjálvandi veðrur eisini tíð til hugnaløtur. leygarkvøldið verður skipað fyri føroyskari kvøldsetu í Katuaq saman við Føroyingafelagnum í Nuuk, har føroyskur matur vderður at fáa, eins og føroyingarnir, sum komnir eru til Nukk í samband við mentanarvikuna, fara at skipa fyri undirhaldi. Birgir Enni er komin úr Føroyum at matgera burtur úr serligum føroyskum rávørum.

Og onkran av døgunum verður farið á flot. Siglt verður í farvatninum uttan fyri Nukk, har mangt forvitnisligt er at síggja.

Mentanarvikan endar týsdagin 11. juni, tá føroyingarnir fara heim aftur við flogfari umvegis Keypmannahavn.

Søluframsýning í Smiðjuni í Lítluvík

Í døgunum frá 11. til 17. juni verður søluframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Tað er 70 ára gamli Elias Joensen, sum hevur framsýning av egnum handarbeiði, og møguleiki verður at keypa lutirnar.

Framsýningin letur upp mánadagin 11. juni klokkan 15, og hon er opin allar dagarnar millum kl. 15 og 19.

Síggj Europa
við Atlantic Airways!

Genéve	fra (3.815,-)	Riga	fra (4.625,-)
London	fra (3.565,-)	Bruxelles	fra (3.440,-)
Lisboa	fra (5.065,-)	Dublin	fra (4.725,-)
Oslo	fra (3.845,-)	Zurich	fra (3.690,-)
Barcelona	fra (4.350,-)	Istanbul	fra (5.310,-)
Prag	fra (4.625,-)	Nice	fra (3.625,-)
Berlin	fra (3.796,-)	Rom	fra (3.790,-)
Budapest	fra (4.580,-)	Wien	fra (4.675,-)
Gøteborg	fra (3.190,-)	Helsinki	fra (4.335,-)
Hamburg	fra (3.190,-)	Malaga	fra (3.975,-)
Madrid	fra (3.975,-)	Warzawa	fra (4.190,-)
Paris	fra (3.565,-)	Amsterdam	fra (3.315,-)
Venedig	fra (4.870,-)	Frankfurt	fra (3.565,-)
Stockholm	fra (3.240,-)	Manchester	fra (4.285,-)
Athen	fra (4.970,-)	Tel Aviv	fra (5.505,-)

Ítøkið prísin er fyrir tað allastóran Føroyar - Keypmannahavn við Atlantic Airways og víðari við SAS. Møguleiki eisini í sambandi við ferðina og ferðavoyjald eru ikki inkluð. APEX treytir eru galdandi og møguleiki er fyri at eindega í Keypmannahavn í mesta lagi 2 dagar.

Ferðirnar kunnu bókleggjast á øllum ferðaskrivstovum kring landið.

Sí annars øll okkara góðu tilboð í blaðnum "Út í heim."

ATLANTIC AIRWAYS
Tel. 34 10 10 - Fax 34 10 01
www.atlantic.fo